lívdin
- í lívd hins hægsta

November 2007



# Vinmenn við í hjálpararbeiði




*Tríggir vinmenn í Afrika. Vinstrumegin frá.: Óli Jákup Jacobsen, Napoleon Smith og Jón Absalonsen*

**Á møtinum sunnudagin 21. oktober greiddi Napoleon Smith frá einum túri, sum hann saman við tveimum vinmonnum var á í afrikanska landinum Zambia. Napoleon greiðir soleiðis frá túrinum:**

„Vit tríggir, Jón Absalonsen, Óla Jákup Jacobsen og eg hugsaðu um at fara til Afrika at gera hjálpararbeiði, og við hjálp og tilrættislegging frá Rólandi í Skorini og zambianaranum David Lukama gjørdist dreymurin til veruleika.

Fyrst vóru vit á einum GLO bíbliuskúla í norður/mið Zambia (Ndola), har vit fingu okkara fyrstu zambiansku vinir; her fingu vit okkara „fyrstu inntrykk“, hjálptu við umvælingum o.a. (hetta er sami skúli, sum David Lukama hevur gingið á, og nakrir føroyingar hava vitjað henda skúlan). Eftir umleið trimum vikum fóru vit ein hugnatúr til kenda ferðafólkabýin Livingstone, har vit sóu Victoria Falls og gjørdu gyrðislop „bungeejumping“. Annar partur av skránni var felagsskapurin Scripture Union í høvuðsstaðnum Lusaka, sum hevur til endamáls at kunna skúlabørn og ungfólk um vandan við HIV, grundað á kristna sjónarmiðið. Har vóru vit í níggju dagar. Síðan fóru vit til næststørsta býin, Kitwe, har vit búðu hjá trúboðarahjúnum og hjálptu á barnalegu í tríggjar vikur. Zambisku børnini eru ein stór uppliving. Tann síðsti parturin av túrinum var tann realistiski parturin: Vit komu til ein kristnan felagsskap, Isubilo, sum ger eitt fantastiskt arbeiði við at taka sær av neyðstøddum familjum og foreldraleysum børnum, sum eru illa rakt av HIV, hungri og fátækradømi. Eg gloymi ongantíð, hvussu rørandi tað var at koma inn til HIV-sjúklingar har í økinum.

Aftan á 10 vikur í Zambia og nøkrum einstøkum londum runt um høvdu vit lært nógv um zambiansku fólkasálina, bæði um neyð og um menniskjaligan samhuga. Ongantíð hevur kríggj verið í Zambia, men tíverri hava gandur og øvundsjúka djúpar røtur. Materialistiskt sæð er nógv neyð, men mong hava sett sítt álít á Ein, sum er hægri, Jesus.“

## Læra at verja einleikan

Í Esaiasi 6:3 lesa vit um, hvussu serafar kunngjørdu dýrd Guds, tá ið teir søgdu: „Heilagur, heilagur, heilagur er HARRIN Gud herskaranna – øll jørðin er full av dýrd Hansara!“

Heildarmyndin av dýrd Guds kemur ikki til sjóndar bert í einari mentan – samkoma Kristusar er so ómetaliga stór og fjølbroytt um allan heimin. Vit skulu læra at góðtaka, stuðla, virða og elska hvør annan við at verja einleikan í ymiskleikum okkara. Tá ið vit læra hetta, fara vit at síggja heildarmyndina av dýrd Guds, og tá kunnu vit syngja við serafunum: „Øll jørðin er full av dýrd Hansara!“



*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

## Kinatúrurin hjá Jógvani

Í september mánaði var Jógvan Zachariassen í Kina og hitti samkomuleiðarar í undurgrundarsamkomunum har. Teir eru leiðarar hjá umleið 55 milliónum trúgvandi kinesarum. Tað eru í dag umleið 130 milliónir persónliga trúgvandi í undirgrundarsamkomunum í Kina. Uml. 10% av samlaða fólkatalinum! Hesir menn og hesar kvinnur, sum Jógvan hitti, eru leiðararnir av størstu veking – í tølum – nakrantíð í heimssøguni.

Tað, sum serliga hugtók Jógvan, var tann brennandi longsulin hjá kinesarum eftir at tæna Jesusi – kosta, hvat tað kosta vil. Eisini stóru visiónir teirra fyri ríki Guds. Ein av stóru visiónunum hjá teimum trúgvandi í Kina er „Back to Jerusalem“ visiónin, sum er, at ein herur av trúgvandi kinesarum skal “marsjera” vestureftir við evangeliinum. Málið er at røkka teimum umleið 50 londunum millum Kina og Jerúsalem – lond, sum í dag eru eyðkend av gudsavnoktan og religiøsum myrkri. Tey trúgvandi í Kina vilja fara inn í hesi lond at peika fortaptum menniskjum á krossin og við kraftini og kærleikanum í evangeliinum fella buddismuna, hinduismuna og islam.

Jógvan var eisini í Hong Kong, og har hevði hann ta gleði at hitta Barbaru Jakobsen, sum er við Doulos.

Nú Jógvan er komin aftur til Føroya, hevur Gud mint hann á, at ríkidømið, sum vit hava í samkomum okkara, og sum er millum trúgvandi í vesturheiminum, er ikki ætlað okkum at savna saman til okkum sjálvi, men til at gera íløgur í ríki Guds um allan heimin, soleiðis at verk Guds kann hava eina so ómetaliga framgongd, sum ikki er til at steðga. Jógvan sigur, at tað var fantastiskt at vera saman við vesturlendskum vinnulívsmonnum, sum hava fingið eyguni upp fyri, at peningur og tilfeingi teirra skulu setast í heimsins skjótast vaksandi samkomu – samkomuna í Kina. Ja, Kristus byggir samkomu Sína, og portur Helvitis fara ikki at fáa vald á henni. Halleluja!





*Jógvan Zachariassen og Barbara Jakobsen umborð á Doulos í Hong Kong*

## Tony Sargent í Lívdini

Sunnudagin 25. november talar Tony Sargent í Lívdini. Tony var í 30 ár pastorur í Worthing Tabernacle í Suðuronglandi. Hann hevur doktaraheiti í gudfrøði frá Westminster Theological Seminary í USA og hevur skrivað bókina „The Sacred Anointing“, sum er um stóra prædikumannin Martin Lloyd Jones.



*Tony Sargent*

Tony er stjóri á International Christian College í Glasgow í Skotlandi. Hann hevur eisini eitt stórt hjarta fyri trúboðan og ferðast nógv í Asia og Afrika, har hann hjálpir teimum fátøku við teirra grundleggjandi tørvum, prædikar evangeliið fyri teimum og hjálpir teimum trúgvandi har í tænastu Harrans.

Tony og kona hansara hava eingi børn, men hava eina stóra tænastu millum børn og ung í India og Glasgow.

Tony vitjaði í Lívdini fyri umleið trimum árum síðani, og vit gleða okkum at síggja og hoyra hann aftur.

## Tillukku við barninum

1. oktober fingu Rini og Sámal Sivertsen í Hoyvík ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3.700 g.

## Faldarin eitt ár




Eitt ár er nú liðið, síðan fyrsti faldarin hjá Lívdini kom út í november 2006.

Endamálið við faldaranum er framvegis, at tað skal vera einfaldari hjá øllum í samkomuni at fylgja við tí, sum fer fram, og at øll, sum skipa fyri ymiskum í samkomuni, brúka faldaran til at lýsa síni tiltøk. Eisini, at Lívdin skal vera ein enn meira viðkomandi samkoma.

# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing, bøn og bønarskúli** **týskvøld kl. 20.00**

| | |
|---|---|
| 6. nov. | Húsbólkar |
| 13. nov. | Bønarskúli. Evni: Bønarlív Jesusar (Jógvan Zachariassen) |
| 20. nov. | Bønarskúli. Evni: Bønarlív Jesusar (Jógvan Zachariassen) |
| 27. nov. | Húsbólkar |

---

## Mammur og børn á Brekku

Nú tað eru so nógvar ungar mammur, sum eru heima við sínum smáu børnum, eru tær farnar at møtast í hølunum hjá Lívdini á Brekku (bygningurin aftan fyri MBM-bygningin við Vegin Langa).

Hetta hevur verið roynt áður, men datt tíverri niðurfyri, so nú verður tað roynt aftur.

Fyrstu ferð var 5. oktober 2007, tá myndin var tikin. Ætlanin er at møtast fríggjamorgun í líka viku frá kl. 10.30 til umleið 12.30.

Allar mammur við smáum børnum eru vælkomnar á Brekku fríggjadagin 16. november kl. 10.30.



*Mammur og børn*

## Lívsdroparnir byrjaðir aftur

Barnatiltakið Lívsdroparnir byrjaði aftur 22. oktober. Lívsdroparnir er eitt tiltak fyri børn frá 1. flokki og uppeftir. Børnini møta kl. 17, og vit fara beint í gongd við ymiskt handaligt sum t.d. træverkstað, seymiverkstað, tekniverkstað, tøving, mála glaskrukkur, perluverkstað. Høvi er eisini hjá teimum, sum einki handaligt gera, at spæla ymisk spøl ella venja okkurt ljóðføri.

Kl. 17.45 savna vit øll børnini í 20 til 25 minuttir til eina framhaldssøgu og sang. Umleið kl. 18.15 fara vit í gongd við tað handaliga aftur. Vit enda kl. 19.

Vit leggja stóran dent á at hava tað stuttligt og vera góð við hvør annan. Ynski og bøn okkara er, at hesi børnini skulu koma at kenna Jesus sum teirra frelsara.

Vit geva stig fyri at møta til tíðina. Tey trý børnini, sum hava møtt best upp, fáa eina gávu, tá vit enda fyri páskir.

Vit vóna, at børnini møta fjølment og hava vinir við.

Vinaliga
Poula og Anna Maria



*Anna Maria Anthoniussen og Poula Sørensen standa fyri Lívsdropunum*




## Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla





### Sunnudagin 4. november

Samkomulega á Zarepta (Eingi møtir í Hoyvíkar skúla)

### Sunnudagin 11. november

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Opið evni*<br>*Talari: Óli Jacobsen (NTM)* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Opið evni*<br>*Talari: Óli Jacobsen (NTM)* |

### Sunnudagin 18. november

*Samfelagsmøti í Ebenezer (Eingi møtir í Hoyvíkar skúla)*

### Sunnudagin 25. november

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Tað, Jesus lærdi um børn*<br>*Talari: Tony Sargent* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00 | *Evni: Tað, Jesus lærdi um kvinnur*<br>*Talari: Tony Sargent* |

* Ungdómsmøti er fríggjakvøld kl. 21 í Hoyvíkar skúla

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni.*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*